

*Lars Müller saman við konu síni, Honnu og dóttrini, Rebekku*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



## » ... eg vænti, at nýggja virksemi í økinum fer at draga fleiri fólk higar, soleiðis at økið gerst meiri áhugavert fær fleiri viðskiftafólk...

LARS MÜLLER

við hesum kunnu skapa eitt nógv áhugaverdari og meiri spennandi handilsumhvørvi fyri okkara starvsfólk, sum ikki ganga einsamøll í handlinum. Nú verða fleiri fólk undir somu lon við ymiskum førleikum, og eg vænti, at hetta eisini verður menn-andi fyri arbeiðsplássið og førleikarnar at veita okkara viðskiftafólkum bestu tænastu.

Lars ivast onga løtu í, at tað eisini fer at koma viðskiftafólkunum til góðar, at útboðið verður enn meiri fjølbroytt, samstundis sum førleikarnir í handlunum at veita bestu tænadstu verða enn størri, enn teir hava verið.

– Jú, eg eri sera spentur upp á hesa verkætlan, og eg trúgvi, at vit fara at fóta okkum í Runavíkarøkinum – til gangs fyri handilsvirksemi, sum er her og fyri tey viðskiftafólk, sum fara at leita til økið, sigur Lars Müller.

Tað verða tær báðar, Byrgerð Kjærbæk og Sigbjørg Hansen, sum báðar búgva á Glyvrum, ið koma at standa fyri tí dagliga.

Ein lærlingur er eisini í handilsbygninginum. Tað er Rógvi Højgaard, sum býr í Saltangará.

*vilmund@sosialurin.fo*

*Tað verða tær báðar, Sigbjørg Hansen og Byrgerð Kjærbæk, sum koma at standa fyri tí dagliga í nýggju handilshúsinum í Saltangará*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*